## Gomlu leiðirnar eru drúgvar

Á Ekofisk-leiðini hava norðmenn fingið meiri olju, at teir høvdu roknað við, og nú vísir tað seg eisini, at meiri olja er í Valhall-økinum enn upprunaliga hildið.

British Petroleum, sum er virkið á báðum leiðunum, hevur higartil gjørt íløgur fyri einar 20 milliardir krónur á Valhall-leiðini, sum er beint sunnan fyri Ekofisk. Men trupulleikin á báðum leiðunum er, at botnurin søkkur, og tí verður neyðugt at skifta pallarnar, sum vórðu tiknir í nýtslu har í 1982. Ein nýggjur pallur fer at kosta millum fýra og seks milliardir krónur, og roknað verður við, at BP fer at nýta einar 17 milliardir krónur til Valhall-leiðina í komandi árum.

Orsøkin er, at tað er meiri olja har enn hildið, samstundis sum nýggj tøkni ger tað møguligt at fáa meiri olju upp úr keldunum. Upprunaliga helt BP, at tað fór at bera til at útvinna 247 milliónir tunnur í Valhall-leiðini, men nú er nøgdin mett til 1,2 milliard tunnur. Tí væntar felagið at útvinna olju har líka til 2040, skrivar Aftenposten.

## Jødarnir rótin til alt ilt

Heimskendi grikski tónasmiðurin Mikis Theodorakis hevur komið sær sjálvum í óføri, tí hann hevur lagt jødarnar at vera rótin til alt ilt.

Tað var í einari kunngerð, at Mikis Theodorakis samanbar jødar við grikkar. Hann segði, at hvørki jødar ella grikkar hava nakra ætt, men at jødarnir eru teir víðgongdu og fáa alt at vera, soleiðis sum teir vilja. Síðani legði hann afturat, at í dag eru jødarnir rótin til alt tað illa, ikki tað góða. Grikska stjórnin vísir orðunum hjá tí kenda tónasmiðinum frá sær, og jødiska ráðið í Grikkalandi leggur hann undir at nýta nazistisk slagorð.

Sjálvur verjir Mikis Theodorakis seg við, at hann hugsaði ikki um allar jødar, men bara teir, sum styðja Ariel Sharon, forsætisráðharra. Hann sigur, at tá ísraelska fólkið hevði stuðul fyri neyðini, styðjaði hann tað. Men teir jødarnir, sum styðja politikkin hjá Sharon, og teir amerikonsku jødarnir, sum eru við til at leggja tann ágangandi politikkin hjá Bush-stjórnini til rættis, mynda eina hugmynd, sum í dag er rótin til alt ilt, sigur hann.

## Vandi í luftini

Loftferðslumyndugleikarnir í Noregi kæra seg núum, at feløg, sum hava ábyrgdina av elkaðalum í luftini, vísa ábyrgdarloysi, tí tey lata vera við at boða myndugleikunum frá kaðalunum.

Í 1996 rendi ein sjúkratyrla á ein luftkaðal í Førdefjørðinum. Tyrlan datt niður, og øll tey fýra, sum vóru í henni, doyðu. Síðani vanlukkuna hava loftferðslumyndugleikarnir kravt, at teir skulu fáa boð um allar luftkaðalar, sum eru meiri enn fimtan metrar høgir, men tað vísir seg, at elfeløgini hava ilt við at halda fráboðanarskylduna.

Loftferðslumyndugleikarnir siga tað vera serliga hugstoytandi, at tað størsta elfelagið, Statnett, stendur ovast á svarta listanum. Leiðslan í Statnett viðgongur, at felagið hevur ikki hildið skyldur sínar, men sigur, at um trý ár verða øll viðurskiftini fingin upp á pláss.

## Danskir handlar fáa kapping

Risastóra týska handilsketan Lidl fer tey næstu árini at geva teimum donsku handilsketunum harða kapping.

Týska handilsketan hevur keypt eitt stórt grundøki í Ringsted á Sælandi, samstundis sum hon fyrireikar seg til at byggja handlar í meiri enn tíggju øðrum donskum býum. Danski umboðsmaðurin hjá Lidl, Finn Tang, sigur við Berlingske Tidende, at næsta heyst hevur fyritøkan millum tíggju og fimtan handlar í Danmark. Ætlanin er síðani at fáa einar 40 - 50 handlar afturat um árið tey næstu árini, til talið kemur upp á umleið 150 um alt landið.

John Wagner, sum er formaður í danska handilsfelagnum, ivast ikki í, at handlarnir hjá Lidl fara at elva til eitt satt prískríggj í Danmark. Hann vísir á, at tað sama hendi, tá Lidl fór undir at fáa sær handlar í Finnlandi, og at tað sama helst fer at henda í Svøríki eisini, har Lidl júst hevur latið tann fyrsta handilin upp.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Saddam stendur aftanfyri



*Seinastu dagarnar hava amerikonsku hermenninir leitað eftir álopshugaðum irakum og vápnum teirra*

**Amerikanskir heryvirmenn siga, at mótstøðan og óskilið í Irak eru so væl skipað, at tað má vera Saddam Hussein, sum skipar fyri**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

-Eg haldi, at Saddam Hussein var greiður yvir, at vit fóru at vinna kríggið, og at hann longu tá fyrireikaði seg til at skipa fyri mótstøðu ímóti okkum aftan á kríggið, sigur amerikanski generalurin Charles H. Swannack í samrøðu við Washington Post.

Generalurin stendur á odda fyri amerikonsku herdeildunum í tí sonevnda Sunni-trýhyrninginum á Bagdad-leiðini. Hann ivast ikki í, at Saddam Hussein og generalar hansara fjaldu ein hóp av vápnum undan og undir krígnum fyri at fyrireika seg til tíðina aftan á sjálvt kríggið.

- Tað er tí vit finna so nógvar vápnagoymslur víða um landið. Teir fyrireikaðu ein uppreistur, sigur Swannack.

Ein annar amerikanskur heryvirmaður, obersturin Oscar Mirabile, hevur somu áskoðan sum generalurin. Hann heldur, at Saddam Hussein visti, hvat hann gjørdi, tá hann slepti øllum brotsmonnum leysum úr fongslunum beint fyri kríggið. Endamálið var at elva til ræðslu og ruðuleika og at fyrireika tað, sum vit nú síggja, sigur Oscar Mirabile.

Aðrir amerikanskir heryvirmenn eru ikki so vísir í, at tað er Saddam Hussein, sum stendur aftan fyri álopini, men teir viðganga, at álopini eru betur skipað nú enn ta fyrstu tíðina eftir kríggið.

# Russar ella CIA elvt til politiska kreppu í Litava

**Formaðurin í litavska tjóðartinginum leggur russar undir at hava elvt til politiska kreppu í landinum. Onnur halda, at CIA hevur verið uppií**

LITAVA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Arthuras Paulauskas, tingformaður, vil vera við, at russar vilja hava eina aðra leiðslu til valdið í Litava, og at russiski ríkmaðurin Jurij Borisov stendur aftan fyri tiltakið.

Borisov fíggjaði ein stóran part av valstríðnum hjá Rolandas Paksas, sum vann forsetavalið í Litava í januar. Fyri nøkrum vikum síðani kom fram, at Borisov hevur tætt samband við russisku mafiuna, og at hann er við í ólógligum vápnahandli. Samstundis er komið fram, at hann fekk litavskan ríkisborgararætt uttan um ta vanligu mannagongdina, og nú verður kannað, um hetta var eitt slag av einari samsýning frá forsetanum.

Skjøl, sum eru komin undan kavi, sigast vísa, at Borisov og forsetin ætlaðu at órógva ta politisku støðuna, soleiðis at teir ráðandi sosialdemokratarnir skuldu tapa næsta val. Ístaðin fyri skuldi høgraflokkurin hjá forsetanum, sum Borisov er limur í, sleppa framat.

Onnur halda, at CIA man eiga sín lut í spælinum. Tey vísa á, at Valdas Adamkus, sum tapti forsetavalið í januar, var meginpartin av lívi sínum amerikanskur ríkisborgari, og at CIA nú roynir at avdúka, at eftirmaðurin hevur ikki so reint mjøl í posanum, sum hann letst hava.



# Løgmaður eigur at geva Bill Justinussen eina átalu

**Bill Justinussen fór út um mark, tá ið hann royndi at forða fyri, at løgtingsmaður slapp at seta spurning fram í Løgtinginum, sigur Edmund Joensen, Løgtingsfor maður**

UPPÍLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Edmund Joensen heldur, at Bill Justinussen fór út um mark í tinginum, mikudagin*

Løgmaður eigur at geva Bill Justinussen, landsstýrismanni, eina átalu.

Tað heldur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Hann heldur, at Bill Justinussen fór út um mark, tá ið hann mikudagin royndu at forða løgtingsmanninum, Heðini Mortensen, at seta ein fyrispurning fram í tinginum.

Løgtingsformaðurin sigur, at hetta er fyrstu ferð hesi sjey- átta árini, hendan skipanin hevur verið í gildi, at landsstýrislimir hava roynt at snúð sær undan einum fyrispurningi. Tað er eisini fyrstu ferð, at ein løgtingslimur atkvøðir ímóti, at ein fyrispurningur verður settur fram.

– Eg helt, eg hoyrdi yvir meg, tá ið Óli Breckmann bað um at tingið atkvøddi um, antin Heðin Mortensen skuldi sleppa at seta spurningin fram, so eg mátti spyrja uppaftur, sigur Edmund Joensen.

Hann sigur, at tað brýtur heilt frá vanligari siðvenju, at tingið atkvøðir um ein fyrispurning.

– Men landsstýrisfólk hava ikki atkvøðurætt í tinginum og tey hava so onki við eina atkvøðugreiðslu at gera. Tað eru bara tinglimir, sum hava við tað at gera.



*– Fái eg eina átalu fyri hetta, takið eg hana sjálvsagt til eftirtektar, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum*

Edmund Joensen sigur, at hetta snýr seg um javnvágina ímillum Løgting og Landsstýrið, tí tað er ein uppgáva hjá tinginum at hava eyguni eftir landsstýrinum. Og tað er eisini hetta, sum er endamálið við flestu fyrispurningunum.

– Tað er heilt skeivt, at ein landsstýrismaður roynir at forða fyri, at ein løgtingsmaður setir ein fyrispurning fram, tí tað hevur hann onki við at gera.

Sostatt er løgtingsformaðurin samdur við Heðin Mortensen í, at hetta er óhóskandi uppílegging í tingsins arbeiði.

– Fyrr hevði landsstýrið í felag ábyrgdina av teimum einstøku málsøkjunum, men nú hava landsstýrismenn hvør sær, ábyrgdin av sínum øki og tí er tað meiri neyðugt nú enn nakrantíð, at tingmenn seta nógvar fyrispurningar fram fyri at kunna fylgja við í tí, sum landsstýrið fæst við.

– Og landsstýrið er uppsitari hjá løgtinginum, onki annað, sigur løgtingsformaðurin. Og hann leggur afturat. at tað viðkemur ikki landsstýrisfólkum at gera av, antin ein spurningur er ov lítisverdur at verða settur.

– Tí haldi eg, at tað, sum Bill Justinussen gjørdi í tinginum mikudagin, var so stór uppílegging í tingsins arbeiði, at tað hevði verið hóskandi við eini átalu frá Løgmanni.

### Politisk profilering

Sjálvur tekur Bill Justinussen tað róligt. Hann sigur, at skal landsstýrismaðurin altíð svara einum spurningi, er ongin orsøk hjá tinginum at atkvøða.

Og tí spurdi hann Óla Breckmann, um tað bar til at fáa tingsins meting av einum slíkum fyrispurningi, sum tann, ið Heðin Mortensen setti fram.

Hann heldur nevniliga ikki, at tað er av umsorgan fyri føðideildini, at Heðin Mortensen setir hendan fyrispurningin fram.

– Eg ivist ikki í, at endamálið er bara at gera vart við seg politiskt, sigur Bill Justinussen.

Hann sigur, at tá ið atkvøtt var um fyrispurningin, hevði hann ikki sæð hann og hann helt, at hann snúði seg bara um brævið frá starvsfólkunum á føðideildini til nakrar fyritøkur um fíggjarligan stuðul.

Nú skilir hann, at spurningurin er eitt sindur meiri umfatandi.

– Og eg meini framvegis, at eg havi mál, sum eru nógv størri og nógv meiri átrokandi at arbeiða við enn hetta.

Bill Justinussen leggur afturat, at hann hevur fingið at vita, at tað var bara í góðari meining, at starvsfólki á føðideildini sendu brøvini út, men at tær eru harmar um tað nú. Tí heldur hann, at fyri tær er tað óheppið at blíva við at draga málið fram.

Fær hann eina átalu frá løgmanni, tekur hann hana sjálvandi til eftirtektar, sigur hann.

**VIÐMERKINGAR**

## Skeiv tulking av veljarakanning

**Helgi Abrahamsen**



Hvørja ferð tá veljarakanningar eru gjørdar, fara politikarar, tíðindafólk og serfrøðingar av ymiskum slag at tulka úrslitið, men ikki kann sigast, at hesar tulkingar altíð eru so væl eydnaðar.

Seinasta dømið upplivdu vit mánakvøldið 10. november, tá nýggjasta veljarakanningin varð almannakunngjørd. Í Degi og Viku varð sagt, at kanningin vísti, at annarhvør føroyingur vildi av við blokkstuðulin, meðan færri enn tíggjundi-hvør vildi hava blokkstuðulin at hækka aftur. Hetta kundi sambært Degi og Viku tulkast sum, at føroyingar sum heild nú taka undir við, at samgongan hevur minkað blokkin við einum triðingi.

Á tingfundinum tann 11. november fegnaðist Karsten Hansen eisini um, at veljarakanningin vísti, at fjøldin av føroyingum vildu gjalda sjálvi, fyri at ráða í egnum landi.

Og aftur í Degi og Viku hóskvøldið 13. november segði Høgni Hoydal, at tað sum fólk eru bangin fyri áðrenn tað hendir, tað taka tey undir við aftaná, og so vísti eisini hann á, at bert fá prosent av føroyingum, sambært veljarakanningini, vildu hava blokkin at vaksa aftur.

**Skeiv tulking**

Um eg varð spurdur í eini veljarakanning, um eg vildi havt blokkstuðulin burtur, so hevði eg sagt nei, og um eg varð spurdur, um eg vildi havt blokkin at vaksa aftur, so hevði eg eisini svara nei.

At halda fram við at lækka blokkstuðulin, er ein uppaftur størri ørskapur enn hann, sum vit longu hava sæð. Men vit kunnu heldur ikki hækka blokkin aftur, tí vit hava jú yvirtikið nøkur málsøki, og tey mugu vit gjalda fyri.

Vit kunnu ikki fara til Danmarkar við biddaraposanum nú (sjálvt um fólk byrja at fáa eyguni upp fyri, at pengarnir fara at mangla í Føroyum).

Sostatt hevði eg (um eg luttók í kanningini) verið ein av teimum, sum sambært Degi og Viku, Karsteni Hansen og Høgna Hoydal taka undir við, at samgongan hevur minkað blokkstuðulin. – Men tað er so langt ífrá, at eg geri tað!

**Skaðin er longu hendur**

Arbeitt verður í løtuni við at gera eina fíggjarlóg fyri 2004, og sera trupult er at fáa kabalina at ganga upp. Men føroyingar (og serliga fullveldisføroyingar) skulu vita, at tá vit um eitt gott ár halda nýggjár, tá hevur niðurskurðurin og fastfrystingin av blokkstuðlinum kostað landskassanum tilsamans umleið 1.200 mió. krónur.

Hetta eru pengar, sum ikki fáast inn aftur við at leggja avgjald á beriposar, vaflur og søtar keks.

Skaðin er longu hendur, og tað einasta sum vit nú kunnu gera, er at vóna, at sitandi landsstýri leggur frá sær, áðrenn skaðin verður uppaftur størri. – Tað vil siga, áðrenn fleiri kostnaðarmiklar yvirtøkur verða gjørdar.

- Og tað hevði so í øllum førðum samsvara væl við úrslitið í nýggjastu veljarakanningini!